## DAGSINS MEINING

# Tá argumentini ikki røkka

Nú sóu vit Jørgen Niclassen tingmann loypa upp í í samrøðu við SvF, tí nakar hevur loyvt sær at reisa spurningin viðvíkjandi tilfeingisgjaldi. Hesa ferð í samband við arbeiðið at ítøkiliggera ymsu deilmálini í samlaða málinum – visjón 2015.

Tað varð ikki sagt beinleiðis, at tað bara var spurningurin um tilfeingisgjald, sum fekk JN at reagera. Heldur varð tosað um, at hetta var ein dupultfunktión, nú arbeiðsbólkur longu er í holt við sama setning í Fiskimálaráðnum. Seinni á kvøldi vórðu onnur dømi tikin fram, har metta varð, at talan var um dupultfunktiónir í arbeiðnum at orða hornasteinarnar í visjónini.

Sjálvandi skulu dupultfunktiónir ikki setast upp í fleng. Til tess er landið ov lítið. Men er tað so, at greiningararbeiðið er gjørt innan setningin hjá fleiri av strategibólkunum í Visjón 2015, so vil hetta alt annað líka gera arbeiðið hjá bólkunum lættari. Ein av fremstu uppgávunum hjá bólkunum er júst at samansjóða tað arbeiðið, sum er gjørt innan ymsu økini. Og er tað eisini hetta, sum er orsøkin til, at flestu av bólkunum hava almennu stjórarnar sum formenn. Júst tí teir hava atgongd til ta servitan og tað kanningar- og greiningarabeiðið, sum longu er gjørt innan ymsu økini.

Tí kunnu hesar útsagnir tykjast kávalótir, sum skulu nýtast til at krógva tað, sum óttin hjá fólkaflokkinum veruliga snýr seg um. Onkursvegna tykist tilfeingisgjaldið at vera eitt illavorðið banniorð. Hetta hóast talan er um tilfeingi, sum er ogn Føroya fólks. Ein ogn, sum kortini er latin nøkrum fáum at umsita, har frí kapping ikki ræður sum t.d. í handverksvinnu ella aðrari vinnu á landi. Í fyrstu atløgu hava hesi fáu fingið ókeypis atgongd til eitt tilfeingi, sum er ogn hjá hvørjum tí einasta føroyingi gott nokk undir ávísum treytum. Og hava tey somu fáu hug at selja hesi rættindi, kunnu tey heysta milliónaupphæddir. Sjálvandi rinda tey skatt av hesum, men anno 2006 skulu tey altso bara lata 18 kr. aftur fyri hvørjar 100, sum tey hava fingið.

Nei – tað er at fegnast um, at málið um eina tilfeingisrentu eisini er tikið við í Visión 2015. At partur av tingmanningini konsekvent noktar at diskutera málið yvirhøvur, tykist bara vera eitt tekin um armóð. Um so er at argumentini ímóti tilfeingisgjaldi eru so eyðsæð sum JN vil gera tað til, so er helst lítil ivi um, at bólkarnir koma til hesa eftir øllum at døma eyðsæddu niðurstøðu, og so er einki mist við at diskutera hetta evnið, tvørturímóti.

Tá hetta er sagt, má sjálvsagt ásannast, at eitt so stórt mál sum Visión 2015 átti at verið viðgjørt millum flokkarnar á tingi, áðrenn tað var sett endaliga í gongd. Bøtið um tað meðan enn tíð er.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Visjón 2015 fyri tónleikin

**SUNLEIF RASMUSSEN**
*Tónaskald og formaður í Musikklærarafelag Føroya*



Í løgmansrøðuni í fjør greiddi løgmaður frá síni visjón fyri Føroyar. Hetta er ógvuliga jaligt og rættir hond út til felags lógvatak, einum betri samfelagi at frama. Málið er at Føroyar skal vera heimsins besta land í 2015.

Um talan er um at vit skulu búgva í heimsins besta samfelag á Ólavsøku 2015 er nú væl minni enn 10 ár, áðrenn hesin dagur er á okkum.

Nú eru so strategibólkarnir mannaðir. Tónlistafólk eru ikki at hóma í hesum bólkum, hóast tað er á tónlistaøkinum at Føroyar hava verið fyri størstu menningini, seinnu árini.

Menningin er hend, hóast tónleikalívið í Føroyum hevur sera ring kor, tá ið samanberast skal við grannalondini.

Men tað hómast – hóast alt – glottar. Tað eru fleiri og fleiri politikkarar, ið jaliga viðgera "Føroya Musikkskúla" og tónleik sum heild. Og tað eru eisini politiskir flokkar, ið sýna "Føroya Musikkskúla" og tónleiki, alt størri áhuga. Hetta vísti viðgerin av uppskoti hjá Tjóðveldisflokkinum um at fáa Musikkskúlaskipanini 2,5 milliónir afturat á fíggjarlógini fyri 2006. Tíverri sveik flokkur løgmans so dyggiliga. Gjørd ger fær onga vend, men Javnaðarflokkurin kann rætta mistakið og gerast ein aktivur viðspælari, at betra um korini á tónlistaøkinum. Eg yvist ikki í at viljin er til staðar. Tað hevur flokkurin víst fyrr.

**Føroyar anno 2005.**
Framgongdin í landinum og nøgdsemi í fólkinum, eru m.a. tengd at einum livandi listarligum umhvørvi. Samfelagið skal kjúkla um, og stuðla sínum listafólkum á allarbesta hátt!

Er hetta so í Føroyum í dag? Svarið er tíverri eitt rungandi nei. Á øllum økjum haltar. Stuðulsskipanin til list er láturliga lág, samanborið við onnur lond her um leiðir. Yrkistónleikarar hava onga sosialskipan, onga eftirlønarskipan og eru heldur ikki partur av einari arbeiðsmarknaðarskipan. Rættindi sum er ein sjálvfylgja í hinum norðanlondunum.

Í ár sluppu 5 føroyskir ungdómar inn á konservatoriir í øðrum londum. Samfelagið hevur brúkt pening til at fáa hesar ungdómar inn á hægri lærustovn í útlondum. Føroyska samfelagið hevur tí eisini skyldu, at skapa góð kor her á landi, so hesir ungdómar venda heim aftur at virka, og ikki bert gerast eitt aktiv í einum øðrum samfelag.

**Nakrar samanlíkningar við onnur lond.**
Í íslendsku musikkskúlaskipanini eru u.l. 600 fulltíðarstørv. Fólkatalið í Íslandi er u.l. 6 ferðir tað føroyska. T.v.s. at í føroyska musikkskúlanum skulu starvast um 100 lærarar fulla tíð, og ikki sum nú, u.l. 30. Musikkskúlaskipanin skal altso hava 7 nýggjar lærarar á hvørjum árið, fram til 2015. Tá er inniverðandi ár íroknað. Á leið góðar 2 milliónir d.kr. skulu setast av um árið, um vit skulu koma á hædd við íslendingar. Men málið er at gerast betri enn øll heimsins lond!?

Íslendingar hava eitt yrkissymfoniorkestur, ið árliga kostar 50 milliónir d. kr. at reka. U.l. 5 milliónir koma frá atgongumerkjasølu og sponsorum. Av hinum 45 millónunum d. kr., fíggjar Ríkið 80 %, Reykjavíkar Býur 18 % og aðrar kommunur fíggja 2 %. T.v.s. at í 2015 skal Føroya Symfoniorkestur hava, í minsta lagið, 9 milliónir d. kr. til rakstur. Í skrivandi stund hevur FSO hálva millión at ráða yvir, so her er bara at bretta upp um armar og byrja beinanvegin. Musikklærarafelag Føroya hevur lagt uppskot fyri mentamálaráðharran, hesum viðvíkjandi. Umframt yrkissymfoniorkestur, hava íslendingar eisini eitt yrkiskamarorkestur, operaorkestur og operakór.

Hetta er alt viðvirkandi til at lítla tjóðin Ísland, er ein lutfalsliga stórur spælari á altjóða tónleikapallinum.

Nú var ikki so nógv ítøkiligt um list í visión løgmans, men kanska kundi hann lært eitt sindur av "politiska andsfelaganum" í Noregi, Jens Stoltenberg.

Tá ið hesin seinast var forsætismálaráðharri, setti hann í verk "Mentanaliga Skúlasekkin".

Hugskoti við "Mentanaliga Skúlasekkinum" var, at øll skúlabørn í norska fólkaskúlanum skuldu uppliva tvær konsertframførslur og tvær sjónleikaframførslur um árið. Við hesum skulu næmingarnir hoyra dygdargóðan tónleik og síggja sjónleik á hægsta støðið, og harvið gerast førir fyri at taka sjálvstøðuga støðu. Framførslurnar skulu tí framberast av fremstu yrkislistafókunum í landinum. Allir skúlar skulu, í hesum sambandi, útnevna ein lærara, ið fekk til uppgávu at fyrireika konsertirnar. Hesin skuldi ikki bert taka sær av teimum praktisku fyrireikingunum, men eisini at fyrireika næmingarnar til listarliga innihaldið á konsertunum ella sjónleikunum.

Á tónleikaøkinum brúkar norski staturin 78 milliónir n. kr. til skúlakonsertirnar. Hetta svarar til at vit í Føroyum skuldu brúkt u.l. 800.000 d. kr. til tílík tiltøk. Sum er, brúka vit ikki eitt klovið oyra.

Til valið í 2005, hevur Jens Stoltenberg og norski Javnaðarflokkurin sett sær nýggj listapolitisk mál. Tey næstu 4 árini fær norska musikkskúlaskipanin 300 milliónir n. kr. afturat. Eisini hevur norski statsministarin lovað, at arbeiða fyri at 1 % av norsku fíggjarlógini skal setast av til skapandi list. Hetta vil eg kalla visjónir! Eg eri sannførdur um, at hetta ikki bert eru tóm vallyftir, tí eftir bert einum árið setti Stoltenberg "Mentanaliga Skúlasekkin" í verk.

Ilt er at meta um, hvussu stór føroyska fíggjarlógin verður í 2015. Men roknast kann við, at hon verður størri enn hon er í dag. So væntandi er at, í 2015 eru einar 50 milliónir kr. í "Listagrunni Landsins", sum skal setast á stovn, heldur í dag enn í morgin.

Livst so spyrst?

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán. kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.